# Jólini avlýst í fleiri skúlum kring landið

**Lærarafelagið noktar lærarum í fleiri skúlum at keypa jólaklipp og pynt til at pynta skúlarnar við uppundir jólini**



*– Hetta kann tykjast hjartaleyst, men tann, sum hevur við fakfelag at gera, má kobla hjartað frá og lata heilan ráða, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag*

SKÚLASTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*

Tað skerst ikki burtur, at ein av stóru løtunum í skúlunum kring landið, er desember mánaði, tá ið skúlar og stovur verða pyntað til jólar.

Men í ár verður øðrvísi, tí í ár verða jólini mestsum avlýst í nógvum skúlum kring landið.

Lærarafelagið hevur nevniliga noktað lærarum at keypa alt, sum hevur við jólapynt at gera, so í ár verður onki pyntað á fleiri skúlum kring landið.

Tað er ósemjan um savnsrøktina, sum aftur nú ger um seg.

Tær stóru kommunurnar í Býarsamskipan Føroya hava gjørt avtalu við Lærarafelagið um savnsrøktina.

Av teimum stóru kommununum, var tað bara Tvøroyri, sum ikki vildi góðkenna skipanina, men síðani hevur Tvøroyrar Kommuna góðtikið at betala savnsrøktina eftir somu avtalu, sum hinar stóru kommunurnar, so har eru viðurskiftini eisini fingin í rættlag.

Hinvegin hevur KommunufelagFøroya ikki góðtikið avtaluna. Men kortini eru tað fleiri kommunur, í Føroya Komunnunufelag, sum gjalda savnsrøktina í teirra skúlum eftir omu avtalu.

Men enn eru nógvar kommunur í Føroya Kommunufelag eftir, sum ikki vilja gjalda eftir semjuni. Og tað eru lærararnir í hesum skúlunum, sum ikki sleppa at keypa jólapynt í ár.

### Onki pynt til jóla

Elsa Birgitta Peteren, forkvinna í Føroya Lærarafelag, váttar, at boðini um jólapyntið á hesum skúlunum fóru út fyrr í vikuni.

– Vit hava mint lærararnar á hesum skúlunum á, at onki skal keypast, heldur ikki til jólapynt, so leingi ósemjan um savnsrøktina stendur við, sigur hon.

Hon sigur, at sostatt sleppa lærararnir á hesum skúlunum ikki at keypa hvørki til klistur, nissur, pappír, klipp, vattkúlur ella nakað sum helst annað.

– Hetta kann tykjast hjartaleyst, men tá ið tú hevur við fakfelagsstríð at gera, verður tú mangan noyddir til at kobla hjartað frá og lata heilan ráða, sigur forkvinnan í Føroya Lærarafelag.

Hon leggur tó afturat, at hóast Føroya Kommunufelag ikki vil góðtaka semjuna, eru tað fleiri kommunur í felagsskapinum, sum hava váttað fyri Lærarafelagnum og Mentamálaráðnum, at tær vilja gjalda savnsrøktini eftir somu avtalu, sum er gjørd við tær stóru kommunurnar og tað góðtekur Lærarafelagið og lærarar á hesum skúlunum eru ikki umfataðir av blokadunum.

### Moltnar undir Kommunufelagnum

Er hetta í grundini ikki bara at revsa lærararnar sjálvar, tí mugu hava børnini undir øllum umstøðum, nú fáa teir bara onki gjørt við teimum?

– Vit vita væl, at tað er strævið, men eitt fakligt stríð er altíð strævið og hóast tað er fakfelagið, sum gongur á odda, eru tað altíð vanligu limirnir sum føra stríðið í verki.

– Men tað er farið at moltna í undir Føroya Kommunufelag, tí fleiri kommunur vilja gjalda eftir semjuni og nógvar hava ringt seinastu dagarnar at spyrja, hvussu tær skulu fara fram fyri at fáa viðurskiftini í rættlag, tí tær vilja eisini ganga eftir semjuni.

– Tað er ikki neyðugt, at kommunurnar góðtaka semjuna. Bara tær betala eftir semjuni, verður tað góðtikið og tað gera fleiri kommunur.

Elsa Birgitta skilir hesar kommunurnar væl, tí í nógvum førum er tað ikki talan um serliga stórar upphæddir, sum kommunurnar skulu gjalda, kanska heilt niður í 3.000 krónur um árið.

# Krøv um sparing eru skot út í tóman heim

**– Tað er ongin avtala í samgonguni um at spara 200 milliónir næsta ár og eg haldi meg til tær avtalur, vit hava gjørt, sigur Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður í almannamálum**



*– Tað er óneyðugt at loyva partapolitiskum ella privat-politiskum markeringum av hesum slagnum í eini tilgongd, sum frammanundan er rættiliga trupult, heldur Páll á Reynatúgvu*

FÍGGJARLÓGIN 2003
*Áki Bertholdsen*

– Tað er ikki gott at vita, um fíggjarnevndin yvirhøvur kann meina tað í álvara.

Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaður, er hampiliga róligur eftir at hava verið í samráði við fíggarnevndina um fíggjarlógina fyri næsta ár.

Í Sosialinum í gjár avdúkaðu vit, at landsstýrismenninir Páll á Reynatúgvu, Bill Justinussen og Annliss Bjarkhamar, hava fingið boð frá samgongulimunum í fíggjarnevndini um at spara einar 200 milliónir næsta ár afturímóti teimum tølum, sum landsstýrið hevur sett á uppskotið til fíggjarlóg.

Av teimum var Páll á Reynatúgvu tann, sum fekk boðini um tær harðastu sparingarnar, tí hann hevur fingið boð um at skarva 90 milliónir av játtanini, sum landsstýrið annars hevur ætlað, at almannamálini skuldi fáa næsta ár.

Men tað tykist sum um Páll á Reynatúgvu er rættiliga sinniligur, hóast hann hevur fingið boðini um hesar umfatandi sparingarnar.

– Eg uppfati ikki fíggjarnevndina sum eitt einaræðisveldi, sum av sínum eintingum kann stinga politikkin hjá samgonguni út í kortið, ella kann áleggja mær sparingar.

– Hinvegin er fíggjarnevndin eitt týdningarmikið amboð til at føra politikkin út í lívið, sum samgongan stingur út í kortið.

– Men tað skal fíggjarnevndin gera útfrá tí leisti, sum samgongan frammanundan er blivin samd um, tí hon kann ikki av sínum eintingum leggja ein nýggja politikk til rættis.

Hann sigur, at samgongan hevur valt fólk í landsstýrið til at skipa stjórn við einum samgonguskjali sum grundarlagi. Hendan stjørnin skal so raðfesta tey øki, sum samgongan er samd um.

– Og tað er hetta, sum varð gjørt, tá ið landsstýrið gjørdi uppskotið til fíggjarlógina fyri næsta ár.

### Misálit á landsstýrið

Páll á Reynatúgvu uppfatar tí kravboðini frá fíggjarnevndini um umfatandi sparingar, sum eitt rímiliga stórt misálit á landsstýrið.

Men so leggur hann afturat, at hann ivast í, um fíggjarnevndin meinar tað í álvara, tá ið hon áleggur honum at spara 90 milliónir.

Og hann heldur, at hetta er tríva dekan og langt inn á øki hjá landsstýrismanninum.

– So er tað ein spurningur, um eg eri rætti maðurin at vera landsstýrismaður, tí so hevði tað kanska verið betri at fíggjarnevndarformaðurin, Óli Breckmann, sjálvur var landsstýrismaður og framdi tær sparingar, hann helt, skuldi til.

– Við øðrum orðum haldi eg, at vil fíggjarnevndin hava so umfatandi sparingar, hevði tað verið sjálvsagt, at hon eisini segði, hvar hon heldur, at tað ber til at spara so nógv.

Sjálvur sær Páll ikki møguleikar at finna sparingar á hasum støðinum innan almannaøki.

– Nógv tað mesta av okkara útreiðslunum er lógarásettar útreiðslur. Tað eru lønir til fólk, sum skulu hjálpa teimum, sum koma í eina trupla støðu, ella tað eru veitingar til fólk í eini truplari støðu. Har er ikki nógv at skalta og valta við, sigur Páll á Reynatúgvu.

– Skulu broytingar gerast, krevjast lógarbroytingar og tað tekur tíð.

– Skal tann avtalaði politikkurin broytast, er tað bara samgongan sum skal gera tað og tað krevur eina meiri djúptøkna viðgerð í samgonguni. Tað er ikki nakað, fíggjarnevndin kann geva okkum harraboð um.

Kemur fíggjarnevndin við boðum, sum ikki eru í samsvari við avtalaða politikkin, kann tað tískil illa takast fyri fult.

– Og spurningurin er, um fíggjarnevndin meinar tað í álvara. Men at koma við so umfatandi kravboðum, uttan at meina tað, er at skapa óneyðugan ótta og tað tænir ongum endamáli.

–Vit eiga ikki at gloyma, at vit eru 17 fólk í samgonguni. Og skulu broytingar gerast, er tað ein fortreyt, at minst 17 tingfólk hava rygg til at gjøgnumføra broytingarnar. Tað er ein veruleiki, sum heldur ikki fíggjarnevndin kann gera nakað við.

Og at boða frá tiltøkum, sum lítil og ongin møguleiki er at gjøgnumføra politisk, er at leypa óneyðugan ótta á alla skipanina og tað er óneyðugt hálvgum framav á henda hátt.

### Út í tóman heim

Men tað eru samgongupolitikarar, sum hava boðað frá, at tað verður neyðugt at spara 200 milliónir á fíggjarlógaruppskotinum næsta ár?

– Hetta eru skot út í tóman heim tí tað er ongin avtala um tað í samgonguni. Verða sparikrøvini meint í álvara, eiga tey, sum seta tey fram, at taka málið til viðgerðar í samgonguni, fyri at vita, hvat meiriluti er fyri.

– Tað kann ikki takast í álvara at politikarar tveita 200 milliónir út í luftina og vóna, at tær dettur niðuraftur sum sparingar onkustaðni aftaná fyrsta januar.

Løgmaður er ovasti politiski leiðarin í samgonguni. Átti hann at tikið stig til at forða fyri slíkum?

– Tey, sum eru vald í landsstýrið, hava fingið litið upp í hendur at stinga politikkin út í kortið og tað vildi verið undarligt at tikið tey av ræði aftur nakrar fáar mánaðir aftaná. Eg haldi, at tað er óneyðugt at loyva partapolitiskum ella privatpolitiskum markeringum av hesum slagnum í eini tilgongd, sum frammanundan er rættiliga trupul.

– So frægt av dissiplin átti at verið innanhýsis í samgonguni, heldur Páll á Reynatúgvu.



Fyrrverandi fiskasølustjórin, Hans Johs. á Brúgv:

# Flytir til Spaniu við allari familjuni

**Í morgin fara Hans Jóhs. á Brúgv, konan, Hanne-Mi og øll fýra børnini niður til havnabýin, Valensia í Spaniu, har tey hava leigað sær eini hús einar 20 km. uttanfyri sjálvan býin**



*– Trivnaðurin hjá familjuni í nýggja umhvørvinum verður altavgerandi fyri, hvussu langur steðgurin í Spaniu verður, sigur Hans Johs. á Brúgv, fyrrverandi fiskasølustjóri*

BURTURHUGUR
*Vilmund Jacobsen*

Hóast hann er í bestu árum, er hann ein tann royndasti á fiskasøluøkinum í Føroyum. Hann hevur arbeitt og fingið sína læru undir flestu stjórum, sum hava verið á Føroya Fiskasølu upp ígjøgnum tíðirnar. At enda sat hann sjálvur við leiðsluni í hesi fyritøku, ið hevur havt um hendi ein stóran part av okkara fiskaútflutningi.

Maðurin er Hans Johs. á Brúgv, fyrrverandi stjóri í Føroya Fiskasølu.

### Øll til Spaniu

Umborð á Norrønu í morgin til Danmarkar verða hann, konan og øll fýra børnini, sum eru millum 2 og 13 ára gomul.

Tey flyta øll til havnabýin, Valensia, einar 300 km. sunnanfyri Barcelona í Spaniu. Málið er fyribils sett til eitt ár. Tað hevur konan, Hanne-Mi, sum er sjúkrasystir, ynskt. Um tíðin í Spaniu verður longri, veldst um, hvussu familjan fellir til.

– Saman við einum systursoni, koyra vit báðir teir 2700 km. niður til Valensia, meðan konan og børnini koma við flogfari úr Danmark. Tey verða ætlandi frammi einar tveir dagar seinni enn vit.

Hans Johs. sigur, at hann og konan vóru í Valensia fyri hálvari triðju viku síðan og kannaðu umstøðurnar.

– Vit hava leigað okkum eini hús í eini bygd, einar 20 km. uttanfyri sjálvan býin.

### Fiskur og mál

Hans Johs. vil enn ikki siga so nógv um, hvat hann fer at takast við í Spaniu, men dylur ikki, at hann fer at arbeiða innan fiskivinnuna, har hann hevur sínar royndir.

– Fyrsta uppgávan hjá okkum verður at fáa familjuna at trívast í nýggja umhvørvinum, og her mugu vit øll gera okkara ítarsta.

Hann sigur, at spaniólar sum heild tosa sítt egna mál – og bara tað, og tí noyðist familjan at læra seg spanskt so skjótt og væl sum tilber.

– Sjálvur skilji eg eitt sindur av sponskum, men tað røkkur ikki langt. So, vit hava øll nógv at læra og vilja fegin læra málið, meðan vit eru í Spaniu.

### Dreymur…

Hans Johs. sigur, at tað hevur leingi verið ein dreymur hjá honum og konuni at sleppa at royna okkurt annað, og hann heldur, at hetta tískil er eitt gott høvi.

– Vit hava meldað okkum í kommununa á staðnum. Tey trý elstu børnini, sum eru ávikavist 13, 10 og 8 ára gomul, fara øll at ganga í sama skúla, sum liggur hálvan annan kilometur frá bústaðnum. Ætlanin er, at konan skal vera heima fyrra hálvárið, men hon kundi eisini hugsað sær at roynt arbeiðslívið í Spaniu, áðrenn vit venda heimaftur.

Hans Johs. á Brúgv leggur dent á, at trivnaðurin hjá familjuni í nýggja umhvørvinum verður altavgerandi fyri, hvussu langur steðgurin í Spaniu verður.

– Tí fara vit serliga í byrjanini at brúka tíð uppá henda partin av gerandisdegnum, sigur hann.

Øll eru tey spent at royna nýggju leiðina og nýggju møguleikarnar, ið bíða teimum fyri framman við miðalhavsbýin í Spaniu.

# Bakur og Stelkur eru nýggju skipini hjá Beta

**Teir fáa fiskiloyvini hjá Munki, Skúgvi og Grælingi. Havhestur verður stakur við fiskiloyvi og fer fyribils at liggja »stand by«, um onkrum skipi hjá felagnum vantar »makkara«**



*Tað hevur verið langt ímillum nýggju skipini í Runavíkar kommunu, men vikuskiftið, 7-8. desember, verður aftur hátíðarhald, tá ið nýggju skipini hjá Beta, Bakur og Stelkur, koma.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nýggju skipini, sum P/F Beta í Saltangará hevur latið byggja í Vigo í Spaniu, eru nú navngivin. Annað skipið kallast Bakur, hitt Stelkur.

Navnið, Bakur, er gamalt hjá Skipafelag Føroya, haðani Beta hevur sín uppruna. Stelkur var navnið á tí níggjunda Cubatrolaranum, sum í sínari tíð varð seldur úr felagnum, tá ið skipini komu til landið í 1977. Stelkur varð seldur bretskum felag, og endaði sum kavaraskip í oljuvinnuni í Persaraflógvanum.

Sosialurin hevur roynt at fingið myndir av hátíðarhaldinum, tá ið navngevingin fór fram í Vigo, men tað hevur tíverri ikki eydnast okkum. Vit vænta tó at hava onkrar myndir tøkar seinni í vikuni.

Sum skilst, var Zacharias Hammer við til hátíðarhaldið í Spaniu, og ætlandi var sending í SvF um hetta í gjárkvøldið.

### Drigið út

Ætlandi skuldu nýggju skipini verða í Føroyum, 3. ella 4. desember, men hetta hevur drigið nakað út, soleiðis at skipini verða í Føroyum, 7. ella 8. desember – alt eftir, nær klárt er at loysa í Spaniu.

Ragnar Olsen hjá Beta sigur, at útgerðin umborð á skipunum verður nú roynd. Spølini skulu trýstroynast, og vissa skal fáast fyri, at øll tann nautiska útgerðin virkar, sum hon skal.

– Tað er jú langur vegur úr Vigo til Føroyar, og tað skuldi helst ikki verið neyðugt at farið niðuraftur við skipunum, tá ið tey fyrst eru komin heim til lands.

Hann sigur, at skiparar og manning eru sera væl nøgd við skipini, og útgerðin vísir seg at virka, sum hon skal.

– Tó skulu neyðugu royndirnar gerast í Spaniu, áðrenn loyst verður komandi leygardag ella sunnudag.

Ragnar sigur, at teinurin heim til Føroya tekur umleið eina viku.

### Tríggir út…

Tá ið Bakur og Stelkur fara í vinnu, fáa hesir fiskiloyvini hjá Munki, Skúgvi og Grælingi.

– Havhestur verður stakur við fiskiloyvi. Sum er, hava vit ongan »makkara« til skipið, sum fyribils fer at liggja »stand by«, um neyðugt verður at seta hann inn fyri onkran av hinum, sum eru í vinnu, sigur Ragnar.

Hann vísir á, at tá ið Bakur og Stelkur fara úr Vigo, verður ein maður minni umborð, enn tá ið teir fara til fiskiskap.

Skiparar á nýggju Betatrolarunum verða Ólavur Samuelsen og Kjartan Egholm.

### Hátíðarhaldið

Umframt manningarnar, vóru eini 25 fólk við til navngevingina og hátíðarhaldið í Vigo. Hetta vóru í fyrsta lagi avvarðandi hjá reiðarínum, viðskiftafólk, ið reiðaríið samstarvar við, SvF-maðurin, Zacharias Hammer og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jørgen Niclasen.

Ragnar sigur, at veðrið var gott, meðan sjálv navngevingin fór fram, men annars var grovur ælingur ein part av tíðini, meðan ferðalagið vitjaði. Hitin lá millum 12 og 15 stig.

Tað hevur verið langt ímillum, at nýggj skip leggja til bryggju í Runavíkar kommunu. Seinastu nýbygningarnir, sum komu til býin, vóru Jaspis og Ametyst, sum komu í 1986-1987.

Hátíðarhald verður, tá ið Bakur og Stelkur koma til landið, og Sosialurin fer at verða við og vitja umborð á skipini.